## DAGSINS MEINING

# Veljarakanningin

Seinasta veljarakanning váttar tað, ið hevur ligið í luftini nú eina tíð. Veljarin hevur mist álitið á fullveldisætlanini hjá samgonguni, um hetta álit nakrantíð var til staðar. Seinastu veljaraknningarnar hava víst ivasama undirtøku hjá samgonguni. Tað, ið er serliga áhugavert við hesari kanningini í mun til undanfarnar er, at veljarin tykist hava tikið støðu. Bólkurin av føroyingum, ið ivast, er minkaður nógv, og sær tað út til, at tey, ið hava ivast, nú eru ímóti ætlan landstýrisins.

Man skal altíð hava í huga, at tað eru hagfrøðiligar óvissur við kanningum sum hesari, men ein munur uppá meira enn 10% kann ikki burturforklárast. Anfinn Kallsberg og Høgni Hoydal mugu sláa seg til táls við, at teir eftir øllum at døma eru í ferð við at fremja nakað, ið ikki er í tráð við fólksins vilja.

Fólkaatkvøðan varð avlýst, tí samgongan visti hvat klokkan var sligin, men nú eru teir í ferð við at fáa eina løgtingssamtykt ígjøgnum, ið hevur minni virði enn ein lóg. Stóri spurningurin er nú, hvat eitt nú Tjóðveldsiflokkurin ætlar sær at brúka hesa samtykt til. Eftir øllum at døma kemur næsta løgting at hava ein meiriluta, ið ikki tekur undir við hesari samtykt, og sostatt verður lag á manni at samtykkja okkurt annð. Um Høgni Hoydal og hansara vongur av Tjóðveldisflokkinum veruliga ætlaðu sær at gera nakað, ið røkkur fleiri valskeið, so høvdu teir verið noyddir at samtykt yvir fleiri løgting. Høvdu teir ført ein semjusøkjandi politikk so var hettar møguligt, men konfrontatiónslinjan, ið hevur verið førd hettar valskeiðið hevur ongan veg ført, og stendur samgongan við forkláringstrupulleikanum, hví teir ikki samtykkja yvir fleiri løgting, sum eitt nú stýrisskipanarbroytingar krevja.

Andstøðan eigur, hóast dygga álitisváttan, at gera sær greitt, at allar súðir ikki eru syftar enn. Vit vita av royndum, hvussu okkara valdømisskipan kann broyta úrslitið av einum vali, soleiðis, at flokkar, ið fáa umdømisvaldar í smáu valdømunum, kunnu gerast stórst í tingmannatali hóast teir ikki fáa flestar atkvøður. Eisini eiga andstøðuflokkarnir longu nú at hugsa um sterka uppstilling. Fólkaflokkurin og Tjó_veldisflokkurin hava altíð dugað væl at sett stemmuslúkarar upp móti hvørjum øðrum á sama lista, og hava sostatt drigið nógvar atkvøður heim í síðstu løtu. Tjóðveldisflokkurin í Eysturoynni og Fólkaflokkurin í Havn eru dømi um hetta. Livst so spyrst.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

### Fólk noyðast at velja:

# Vælferðarsamfelagið her og nú – ella fullveldið her og nú!

**Birgir Mohr**
*Sandi*



Í dag er tað blivið meira greitt enn nakrantíð, at vit føroyingar noyðast at velja annaðhvørt: um vit skulu krevja og fáa fullveldi (loysing) her og nú, so um Tjóðveldisflokkurin og aðrir hava kravt tað, og harvið missa tað føroyska vælferðarsamfelagið á gólvið, ella vit skulu krevja av okkara politikarum og fáa vælferðarsamfelagið gjørt tíðarhóskandi her og nú, so sum til dømis Javnaðarflokkurin ynskir tað.

Hetta seinasta inniber, at vit lata spurningin um fullveldi bíða til tíðin er búgvin, so vit føroyingar eru førir fyri bæði at útinna og gjalda fyri eina møguliga loysing, ella sagt við øðrum orðum, at fara burtur úr ríkisfelagsskapinum. Ístaðin eiga vit at halda áfram at víðka um okkara sjálvstýri og gera eina nýggja avtalu við Danmark um ríkisrættarligu støðuna.

Vit eru noydd til at velja. Tað sæst týðuliga, hvussu vælferðin forfellur í Føroyum í dag. Vit orka ikki fíggjarliga hvørki at viðlíkahalda, enn minni at betra um okkara vælferðarskipanir, tí vit nýta politikkin – pening og arbeiðsorku – til at avtaka blokkstudningin úr Danmark yvir 4 ár og yvirtaka øll málsøki og loysa, uttan at taka avleiðingarnar herav í álvara.

Vælferðarsamfelagið, sum nú forfellur, so vit verða sigld afturút í mun til hini londini í Europa, er ein høvuðsfyritreyt fyri trivnaðin hjá okkum føroyingum, sum nú liva, og vit hava krav uppá sømulig kor, óansæð hvørji vit eru og hvar vit eru í Føroyum.

Fullveldi her og nú er fyrst og fremst ein háfloygd ætlan, sum als ikki er alneyðug fyri okkum, og er kanska heldur ikki so skilagóð, tí hon kostar okkum so nógv, bæði í vælvilja, pengi og trivnaði. Møguliga hevur onkur av samgonguflokkunum ásannað hetta og tí broytt politikk hareftir?

Meira sjálvstýri er ein tilgongd, sum hevur verið síðan 1948, og sum saktans kann halda fram undir skipaðum viðurskiftum og avbalanseraðum meirkostnaði fyri okkum í mun til vøkstur í inntøku okkara. Hendan skipaða tilgongd gevur okkum tíð til at fyrireika yvirtøkur av málsøkjum, so vit veruliga eru før fyri at umsita hesi til fulnar, og ikki sum nú í skundi og hálvum verki.

Ein slík tilgongd – sum kann vara eini 15–25 ár leysliga mett, vil enda við, at vit hava yvirtikið øll – ella nærum øll málsøkir at umsita og gjalda sjálvir, hóast vit eru í einum frælsum felagsskapi við Danmark – einum ríkjafelagsskapi ella ríkisfelagsskapi. Fyrst tá er tíðin búgvin til at taka støðu til, um vit eiga at loysa frá Danmark.

Tað er eingin góð grund til at framskunda tilgongdina í sjálvstýrismálinum, men tvørturímóti eiga vit at steðga á og umhugsa okkum væl, og vit eiga fyrst av øllum at fara undir at loysa stóru trupulleikarnar hjá føroyingum á tí sosiala økinum, á útbúgvingarøkinum, á eftirlønarøkinum, á heilsuøkinum o.ø. økjum við.

Tað er umráðandi fyri okkum sum mentað fólk at fáa hesi viðurskifti í rættlag og at seta vælferð fólksins í hásæti fram um tær háfloygdu fullveldisætlanir, sum higartil einki annað hava givið enn nakrar proklamatiónir og minkandi vælferð og trivnað. Hetta fara komandi valini til Løgting og fólkating at snúgva seg um – føroyingar noyðast at velja.

# Ein føroysk komedia!

**TÍÐINDASKRIV**
*Leikhúsið Gríma*

Leikárið 2001-2002 er byrjað hjá Leikhúsinum Grímu á Meiaríið, og tað verður lagt út við einum nýggjum føroyskum skemtileikið hjá Súsonnu og Hans Tórgarð.

Nú er látur at hoyra úr Meiarínum í Havn, tí leikhúsið Gríma er nú komi væl áleiðis við venjingunum av tí nýggja skemtileikinum „Fótur í Hosu" .

Hesin skemtileikur er skrivaður úr tí tíðini vit liva í, í dag, í morgin ella kanska var tað ígjár. Vit kenna typurnar aftur tí her eru bæði grannin, og kanska eisini fastur við sum typir.

Ein skrellimaður, ein dama av tí „lættlivandi" slagnum og ein danskur taxachauffør finna tvær føtur í einum skrelliposa. Skrelliposin kemur frá bankastjóranum sum býr hinumegin vegin, og áðrenn nakar veit av er alt ein syndigur hurlivasi av fólkapensjónistum, whiskyfløskum, puddilhundum, elektrikarum, skóleysum alkoholikarum, rabarbusúltutoyið og Ga-joli!

Súsanna og Hans Tórgarð ið hava skrivað leikin, eru kend á føroyska leikpallinum, og vita tey tí hvørjar streingir tey skullu røra við fyri at skemta áskoðarunum. Hans leikstjórnar sjálvur leikinum og hevur hann eisini gjørt pallmyndina. Afturat sær hevur hann Edward Fuglø, ið hevur staðið fyri búnum, pallmáling, rekvisittum, plakat og mongum øðrum. Leikarar eru Kristina Hansen, Birita Mohr, Ria Tórgarð, Egi Dam, Aksel Joensen, Høgni Johansen og Kári Øster. Zacharias Guttesen hevur ljóssett.

Fótur í hosu, verður sýndur fyrstu ferð á Gamla Meiarínum leygarkvøldið 29. september kl. 19.00.

Leikurin verður sýndur í september & oktober, og so leingi sum fólk koma. Sýningar verða týsdag, mikudag, hósdag og fríggjadag kl. 20.00, og leygardag og sunnudag kl. 16.00 Eisini verður farið út um landið at ferðast við leikinum.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## VIÐMERKINGAR

# Kapping á jøvnum føti

**Andras Róin,**
*stjóri*
*Føroya Tele*
*Tórshavn, tann 21. september 2001*



Tað hevur seinastu tíðina verið frammi í fjølmiðlunum um, at stríð hevur tikið seg upp millum Fjarskiftiseftirlitið og Vinnumálastýrið øðrumegin og Føroya Tele hinumegin.

Fyri Føroya Tele er málið av sera stórum týdningi, tí tað snýr seg um, at felagið higartil ikki hevur fingið loyvi til at kappast á jøvnum føti við aðrar veitarar í Føroyum. Orsøkin er, at Fjarskiftiseftirlitið hevur sýtt Føroya Tele at fremja avsláttarskipanir hóast søkt hevur verið um hetta síðani í vár, og hóast aðrir veitarar hava fingið loyvi til tess.

Málið er neyvan egnað at verða greinað sundur í einum almennum kjaki, men Føroya Tele metir, at nakrar rættleiðingar eru neyðugar.

Rættleiðing viðvíkjandi Landsstýrismanninum í Vinnumálum

Samrøða við Føroya Tele í Sosialinum tann 5. september 2001 kann skiljast soleiðis, at Landsstýrismaðurin í Vinnumálum, Bjarni Djurholm, verður lagdur undir, at Vinnumálastýrið, við at skifta til annan veitara enn Føroya Tele, minkar um virðið av almenna partafelagnum og styðjar skeivregulering.

At Vinnumálastýrið ella ein og hvør annar kann velja at skifta veitara, er ein natúrlig avleiðing av, at kapping er á fjarskiftismarknaðinum. Tað einasta Føroya Tele ynskir, eru javnbjóðis møguleikar at kappast við aðrar veitarar og at hesi viðurskifti eru so greið og forútsigilig sum gjørlig. Tá ið Føroya Tele í hesum sambandi nevnir Landsstýrismannin er ”adressan” skeiv, tí Føroya Tele hevur bert eitt mál koyrandi við Fjarskiftiseftirlitið og sostatt ikki við Vinnumálastýrið og Landsstýrismannin í Vinnumálum.

**Rættleiðingar viðvíkjandi Fjarskiftiseftirlitinum**
Í Sosialinum tann 7. september 2001 úttalar stjórin á Fjarskiftiseftirlitinum, at Fjarskiftiseftirlitið gevur øllum somu viðferð, men at Føroya Tele ikki megnar at svara settum spurningum.

Til hetta er at siga, at Føroya Tele leypandi hevur svarað øllum spurningum, sum Fjarskiftiseftirlitið er komið við, hóast Fjarskiftiseftirlitið støðugt hevur sett fram nýggjar spurningar. Eisini hevur Fjarskiftiseftirlitið viðgingið, at størri krøv verða sett til Føroya Tele enn tey, ið sett verða til aðrar veitarar, og tískil er ikki talan um at øll fáa somu viðferð.

Í útvarpinum hósdagin tann 13. september 2001 verður stjórin á Fjarskiftiseftirlitinum endurgivin fyri at siga, at orsøkin til, at Føroya Tele ikki sleppur at veita avsláttur til síni viðskiftafólk, er ”tí roknskapurin hjá felagnum er ikki sundurskildur, so til ber at síggja, um Føroya Tele flytir pengar millum ymsu virkisøkini”. Stjórin vísir á, ”..at Føroya Tele áður hevur fingið longt freistina fyri sundurskildan roknskap við einum ári, og at teir enn ikki eru til reiðar kemur teimum so aftur um brekku nú”.

Í hesum sambandi skal gerast vart við, at Føroya Tele hevur ikki fingið útsett freistina í eitt ár. Í 1999 fekk felagið konsessión frá Fjarskiftiseftirlitinum har krøv til framtíðar roknskaparligar upplýsingar eru í, millum annað eitt krav um sundurskildan roknskap fyri roknskaparárið 2001. Hetta kravið fer felagið at uppfylla til ásettu tíð.

**Viðmerkingar annars**
At kapping er komin á føroyska fjarskiftismarknaðinum er at fegnast um. Men kappingin má hava til endamáls, at fáa til vega so bíligar og góðar tænastur til viðskiftafólkini sum gjørligt. Eisini má kappingin fara fram undir greiðum og forútsigiligum viðurskiftum.

Minsta kravið má verða, at fjarskiftisveitararnir verða viðgjørdir eins av Fjarskiftiseftirlitinum, og at kappingin kann fara fram á jøvnum føti í so máta. Alt annað vil verða til stóran skaða fyri bæði viðskiftafólk og fjarskiftisøkið sum heild.

# Viðmerking

**Malan Johannesen**

Í Sosialinum mikudagin gjørdist er rætttiliga kløkk av at síggja hesa yvirskriftina: "Vit eiga at varða okkum fyri muslimum". Ein stutt grein við viðtali við Jenis av Rana stóð niðri undir. Men tað er mest yvirskriftin, sum eg havi nakað at viðmerkja til.

Øll eru vit uppreitt av ræðuliga terrorálopinum á New York og Washington og sjálvandi allarmest amerikanska fólkið og leiðarar tess. Tað gekk heldur ikki long tíð, so varð greitt fyri forsetan at hann mátti bjóða av til kríggj. Oddamenn um allan heim buðu sær til at hjálpa í hesum kríggi. Men enn havi eg ikki hoyrt nakran sagt, at tað eru muslimar sum eru fíggindin - bara í hesari greinini havi eg higartil sæð tað. Vónandi er hetta alt ein misskiljing, men eg haldi meg til at tala at kortini. Fíggindin er, sum eg havi skilt tað, og sum amerikanski forsetin ferð eftir ferð hevur víst á, terrorisman. Hann hevur kanska eisini sagt altjóða terrorisma, men terroristar eru altso fíggindin, ikki muslimar.

Terrorisma hevur mong andlit. Í grannalandi okkara Bretlandi uppliva tey dagliga bumbuhóttanir og summatíðir er tað ikki bara hóttan. Longur suðuri í Spania verða ferðsfólk eisini javnan hótt av terroratsóknum. Eg skal ikki fara undir at greiða frá teimum politisku viðurskiftunum, sum eru orsøkin til hetta eftir okkara tykki skilaleysa terrorvirksemið, men eitt fyribrigdi gongur aftur í øllum hesum og tað er fanatisman og hana finna vit allastaðni, eisini her hjá okkum.

Vit eru tíbetur sloppin undan terroratsóknum og ein orsøkin til tað er at vit hava eina demokratiska skipan og eitt rættarsamfelag. Tað hava vit valt framum alt annað, tí vit halda at tað er tann besta skipanin. Men demokrati er ikki ókeypis. Ein av størstu sorgarleikunum undan 11. sept varð bumbingin av einum fyristingarhúsum í Oklahoma eisini í USA. Hesa ferð stóð ein ella kanska fleiri amerikanskir fanatikarar aftan fyri. Eisini í einum demokratiskum landi finna vit sostatt fólk, sum eru so fanatisk, at tey vandaliga fyrireika eina atsókn til tess at beina fyri sínum egna fólki. Vit kunnu sostatt síggja bæði Jenis og meg sjálva, sum ein potentiellan fígginda. Tí er tað lívið um at gera fyri amerikanska forsetan og eisini okkum her heima at varða okkum fyri, at vit ikki koma okkum útí eitt stríð, sum bara elvir til meiri fanatismu og terrorismu. Vit varða okkum ikki við at skýra eina heimstrúgv fígginda, men bara við í tí dagliga lívinum og tí demokratiska kjakinum at tryggja okkum, at onki er sum gevur gróðrarbotn fyri fanatismu.

Eg veit ikki, hvussu mangir muslimar eru í landinum - men tað skal verða mín vón at hetta blaðið og okkara fólkavaldu halda seg burtur frá at birta uppundir, at hesir medborgarar okkara á nakran hátt kenna seg hóttar av Jenisi og mær!

# VIT eita nú Faroesoft

**TÍÐINDASKRIV**

Ein vælkend KT-fyritøka í Føroyum skiftir nú navn, frá VIT til Faroesoft.

Navnabroytingin kemur í samband við at fyritøkan, sum er ein partur av Farodane-samtakinum, er farin í nýggj hølir, og at dentur framyvir verður lagdur á menning av forritum til føroyskar og útlendskar fyritøkur.

**Drúgvar royndir innan menning**
Faroesoft er ongin ársungi, tá talan er um menning av forritum. Áinternetøkinum stendur Faroesoft aftanfyri mest nýttu heimasíaurnar í Føroyum, so sum nummarupplýsingina (www.nummar.fo), virkisskránna (www.gulu.fo) og roknskaparyvirlitiá www.business-line.fo. Uttanlanda hevur Faroesoft kundar í Danmark, Noregi, Onglandi og á Malta. M. a. veitir Faroesoft skipanir til ítróttarveddingarfyritøkur, og veráur í løtuni arbeitt viá at fáa slíkar fyritøkur at skráseta seg í Føroyum og brúka føroyskar veitarar.



*Savnsmynd*

Eitt annað virkisøki eru sonevndar "soft software" skipanir, taá eru innanhýsis skipanir sum ikke eru bókhaldsskipanir. Mest kendu skipanir teirra eru Netbase CMS til umsiting av heimasíáum, JournalVIT til journalisering og sakstýring; GóðskuVIT til ISO9000-umsiting hjá fyritøkum, og HACCP-umsiting hjá matvøruframleiðarum; KommunuVIT til kommunur; og HavnaVIT til havnaumsiting.

Á Faroesoft starvast 11 fólk, m. a. serfrøðingar útbúnir innan Microsoft-tøkni og Notes-tøkni. Faroesoft er Microsoft Certified Partner, og limur í IBM Lotus Notes Partner World. Faroesoft hevur egnan grafikara, sum tekur sær av at tryggja at skipanirnar eru snøggar og lættar at brúka.

**Rakstur av skipanum**
Eitt triðja høvuðsøki hjá Faroesoft er rakstur av skipanum. Faroesoft rekur í dag egnar ambætarar í Føroyum og í London, har m. a. peningaflutningur um netið verður avgreiddur. Talan er um sera framkomna útgerá, sum virkar og verður ansað 24 tímar um døgnið.

**Nýggir arbeiðshættir**
"Soft software" er eitt nýtt hugtak í Føroyum. Talan er um skipanir, sum virka saman við bókhaldsskipanum, bíleggingarskipanum og øðrum, og soleiðis fáa allar skipanirnar at virka sum ein og sama skipan. Hetta lættir sera nógv um arbeiðsbyrðurnar og er við til at skapa nýggjar arbeiðshættir.

Sum tann einasti hevur Faroesoft tikið stig til at menna hetta slagið av forritum til føroysk viðurskifti. Og í Føroyum eru sera góðar umstøður til at fáa hesar skipanirnar til at virka væl. Til ber at gera skipanir, sum fevna um fleiri fyritøkur, og sum samskifta millum kundar, veitarir og almennar stovnar.

**Móttøka**
Í samband við navnabroytingina verða øll núverandi og komandi viðskiftafólk boðin við til móttøku, fríggjadagin 28. september frá kl. 15.00.